Sjúkrasystrafelagið:

# Ongar sjúkrasystrar fara at søkja

**Sjúkrasystrafelag Føroya vil ikki kalla tað fyri, at tær fara at blokera størvini á B6. Heldur verður tað ein áheitan til allar limirnar í felagnum, ikki at søkja leysu størvini. Samstundis verður ført fram, at tað heilt einfalt ikki eru nakrar sjúkrasystrar, sum kundu søkt størvini**



*Jana Dalsgaard roynir nú at fáa sínar limir ikki at søkja størvini á Landssjúkrahúsinum. Hetta vísir eisini á, at tað ikki eru nakrar sjúkrasystrar til at søkja størvini*

B6

*Heri á Rógvi*

Tann kendasta deildin á Landssjúkrahúsinum í løtuni er uttan iva B6. Tað er heldur ikki so undarligt, tá ið at kalla allar sjúkrasystrarnar á deildini siga upp mestsum ísenn. Fyrsta dagin í komandi ári verður tað tómt á deildini, tá ið ongar sjúkrasystrar ætla sær at vera til arbeiðis, um ikki ein loysn verður funnin.

Sjúkrahúsleiðslan hevur sett 7. desember sum freist fyri, nær ein loysn skal vera funnin. Verður eingin loysn funnin, sær leiðslan ongan annan útveg, enn at fara at søkja eftir nýggjum starvsfólki.

### Ongar sjúkrasystrar

Í Sosialinum mikudagin segði forkvinnan fyri Sjúkrasystrafelag Føroya, Jana Dalsgaard, at fór sjúkrahúsleiðslan at søkja eftir nýggjum fólki, so vistu tær sær ikki onnur ráð, enn at blokera størvini á B6. Talan var eisini um at blokera øll størv á Landssjúkrahúsinum. Sjúkrasystrafelagið hevur síðani fingið møguleikan at endurskoða orðavalið, tá ið orðið blokera varð nýtt. Tá ið sjúkrasystrarnar sjálvar hava sagt seg úr starvi, so verður tað trupult hjá Sjúkrasystrafelagnum alment at blokera størvini, hóast hetta var tað, ið varð sagt.

– Tað, sum vit ætla, er at heita á allar okkara limir um ikki at søkja størvini á Landsjúkrahúsinum, sigur Jana Dalsgaard.

Við hesum ásannar Jana Dalsgaard, at tað ikki liggur ræðið fyri hjá teimum soleiðis uttan víðari at blokera størvini. Loysnin, sum Sjúkrasystrafelagið velur, byggir á eitt solidariskt prinsipp heldur enn eitt reint fakfelagsligt stig. Hóast Sjúkrasystrafelagið heitir á sínar limir um ikki at søkja, so kunnu sjúkrasystrar framvegis søkja størvini – eisini úr øðrum londum. Men hetta er ikki nakað, sum órógvar Sjúkrasystrafelagið stórvegis.

– Tað eru ongar sjúkrasystrar at søkja tey leysu størvini á B6. Hetta fer heldur ikki at broytast við tíðini, tá ið framrokningar vísa, at tey næstu árini fara at vanta fleiri og fleiri sjúkrasystrar, sigur Jana Dalsgaard.

Jana Dalsgaard vísir eisini á, at sjúkrasystrarnar, sum arbeiða á B6, hava vunnið sær servitan á økinum, og hesin verður torførur at finna aðrastaðni.

### Slítast upp

Sjúkrasystarfelagið hevur higartil roynt at viðgjørt málið sum eitt mál millum sjúkrasystarnar og leiðsluna. Tá ið sjúkrahúsleiðslan alment tekur til orðanna í hesum spurninginum, so tók Sjúkrasystrafelagið eisini til orðanna.

Forkvinnan í felagnum vísir á, at sjúkrasystrarnar á B6 leingi hava stríðst við trongum korum, og tær hava eisini roynt at fingið leiðsluna at skilja, hvussu torfør støðan er. Jana Dalsgaard vísir til teir mongu sjúkradagarnar sum dømi fyri, hvussu strævið tað er at arbeiða á deildini.

– Støðan er veruliga vorðin ring, um sjúkrasystrarnar velja at siga seg úr starvi, tá ið tær veruliga hava stríðst fyri at betra korini, sigur Jana Dalsgaard.

Forkvinnan í Sjúkrasystrafelag Føroya leggur eisini dent á, at sjúkrasystrarnar í longri tíð hava bæði víst á trupulleikan og eisini víst á útrokningar, sum vísa, hvussu støðan kundi verði betra.

Tað er serliga talið av tímaløntum starvsfólki, sum verður nýtt sum dømi. Sum nú er so siga sjúkrasystrarnar, at tað skal nýtast nógv orka til at ringja eftir starvsfólki, ið skiftandi røkja uppgávur á deildini.

– Hevði hetta verið broytt, so hevði verið pláss fyri kanska tveimum starvsfólkum afturat, sigur Jana Dalsgaard.

Leiðslan og B6-sjúkrasystrarnar:

# Á fund um málið



*Stríðspartarnir seta seg við fundarborðið hóskvøldið fyri at finna eina loysn á málinum. Hvørgin partar ætlar tó at slaka í málinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sjúkrahúsleiðslan og sjúkrasystarnar á B6 hava avtalað fund millum partarnar, men 7. desember verður framvegis settur sum freist fyri, nær ein loysn eigur at vera funnin**

B6

*Heri á Rógvi*

Hóskvøldið kl. 19 er boðað til fundar millum sjúkrahúsleiðsluna og starvsfólk á B6. Fundurin verður kallaður fyri ein dialogur millum leiðslu og starvsfólk. Tað má eisini sigast at vera í tøkum tíma, at hesin fundurin verður hildin. Sjúkrahúsleiðslan hevur áður boðað frá, at hon ætlar sær at søkja eftir nýggjum starvsfólki, um ikki ein loysn verður funnin innan 7. desember (blaðið verður prentað hósdag). Hesum ætlar Jóanis Erik Køtlum, sjúkrahússtjóri, ikki at sleppa.

– Vit fara at royna at skapa ein dialog millum partarnar, men hetta merkir ikki, at vit útseta okkara freist at søkja eftir nýggjum starvsfólki, sigur Jóanis Erik Køtlum.

Sjúkrahússtjórin sigur við Sosialin, at teir hava sett tríggjar tímar av til fundin. Hesir vera so eftir øllum at døma avgerandi, tá ið leiðslan og starvsfólki eru langt frá hvørjum øðrum, og ikki long tíð er at nýta.

Jóanis Erik Køtlum vónar, tað fer at eydnast teimum, at finna eina loysn á hesum málinum. Verður eingin loysn funnin, so er hann klárur at fara at søkja eftir nýggjum starvsfólki. Hann sigur ikki nakra avgerð vera tiknað, um leiðslan ætlar sær útum landoddarnar at søkja eftir fólki, men hann sigur, at teir væntandi fyrst fara at royna heimamarknaðin.

Ingun Gaardbo, álitisfólk á B6, sigur seg eisini vóna, at tað verður funnin ein loysn á málinum á fundinum. Hetta merkir tó ikki, at tær á nakran fara at slaka í teirra í krøvum.

– Vit fara heldur ikki at slaka, nú vit nærkast tíðarfreistini hjá leiðsluni, sigur Ingun Gaardbo.

Partarnir fara tó ikki einsamallir á fund. Eftir hvat Sosialurin hevur fingið uppspurt, so tekur sjúkrahúsleiðslan Jan Willemoes, virkissálarfrøðing, við á fundin. Sjúkrasystarnar hava Hans Trygva Teirin, sum er akvokatur hjá teimum, við sær á fund.

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 7. desember til hósdagin 13. desember

## Okkara kokkar




*Hesaferð verður vitjað á Hotel Hafnia og aftan á matgerðina tosar Guðmundur við Johan M. Restorff og Ingigerð á Trøðni*

## Syngið við

*Heri á Rógvi ummælir:*



Fólkatingsvalið hevur verið, og Fólkatingið er nú mannað. Eisini vit í Føroyum mugu ásanna, at spenningurin og alt hitt, sum hópar seg upp í sambandi við eitt fólkatingsval, er farið aftur um bak. Vit eru tó ikki heilt fremmand fyri hesum góða fólkatingi, tá ið Fogh og hinir hava tingast, soleiðis at vit nú hava eina nýggja danska stjórn, og hetta eru vit áhoyrarar heldur ikki vorðnir snýttir fyri. Men tú kemur ikki uttanum, at henda seinasta vikan ella so hevði ikki eitt so haldgott støðufesti ovarliga á spenningsásini í mun til dagarnar við vali, kjaki og ikki minst vinnarum og taparum. Lukkuliga fyri øll, so eru jólini ikki so langt burtur, og vit kunnu so smátt byrja at lata upp og bíða eftir einari tíð, har sjónvarp og útvarp veruliga kunnu sleppa at fylla dagligdagin við jólaheilsum og øðrum, sum hoyrir hesari tíðini til. Sjónvarp og útvarp fáa um hesar tíðir veruliga eitt serføroyskt snið, har serstøku føroysku ljóðini verða stroydd runt kring landið.

Loftmiðlarnir eru eisini farnir at brynja seg út til jólini, og tað eru eisini børnini, ið njóta væl av hesum, og hetta skulu tey eisini. Í ár er tað sjónvarpið, ið gongur undan við sendingum annað hvørt kvøld til børnini. Tað kann valla sigast øðrvísi enn, at tað er frálíkt, nú almenna sjónvarpið leggur so stóra orku í hesar sendingar, sum óivað fella í góða jørð hjá málbólkinum.

Tað tykist sum um, at teir báðir stóru loftmiðlarnir og eisini teir smærru hava lagt sítt virksemi í eina fasta legu. Útvarp Føroya hevur eitt nú at kalla hvønn dag eina ella aðra upplýsandi sending, har tað ikki bert verður lisið burturúr tíðindum. Eisini her klárar føroyska sjónvarpið at fylgja so dánt við, og fremsta fjølmiðla ikon føroyinga, Dagur og vika, hevur eisini fingið knýtt ein frískari part afturat sær. Hóast teir flestu av hesum eru tikinir úr danska partinum av loftmiðlaverðini, so er nú eisini komin ein partsending við innihaldi úr føroyska mentanarheiminum. Hetta nýggjasta brotið av Degi og viku var ógvuliga áhugavert at hyggja at, hóast sniðið við vertinum sum millummanni var bæði stirvið og tungt.

### Pusalaknektur

Tað er klárt, at vit skulu hava føroyskt undirhald og á føroyska sjónvarpsskíggjan. Hesa skriftina hava framleiðararnir hjá sjónvarpinum eisini sæð, og úrslitið hesa seinastu tíðina hava verið nakrar sendingar, ið kallast fyri Rangt og rætt. Hesar eru sendingar, ið vit hava sæð áður bæði í føroyskum og útlendskum sjónvarpi. Henda seinasta vikan borgaði eisini við einari sending av hesum slagnum, har tað snýr seg um at gita, hvat er rangt og hvat er rætt. Gamansleikurin steðgar ikki her, tí luttakararnir sleppa bæði at gita sangir og eisini tann duldi luturin fyllir sín part av sendingunum.

Tíðin er farin frá tí, at vit sita gapandi og grínandi og hyggja at einari sending, bert tí hon er føroysk. Framleiðararnir hava mestsum tikið tað mest grundleggjandi úr upprunaligu sendingunum, og vit sita eftir við einum úrsliti, sum er eitt sindur ein veg og eitt sindur hinvegin. Orðagáturnar verða settar til síðis fyri tí ikki so hugnaliga sanghugnanum, og tað verður eisini roynt at fylla sum frægast við skemtiligum liðleiðarum, sum ikki smæðast við at siga sítt, hóast alt ikki júst er so skemtiligt. Tað skakar og rystir, men úrslitið má vera rangt.

### Somu tíð – sama stað

Tey, sum vóru so mikið heppin at lurta eftir Útvarpi Føroya sunnukvøldið, varnaðust, at teir høvdu sett Messias hjá Händel á skránna. Klokkan átta sunnukvøldið sendi Sjónvarp Føroya konsert í sambandi við sangskeiðið hjá Heimamissiónini. Tað kom kanska óvart á fleiri, at Messias konsertin eisini varð send í útvarpi klokkan átta. Við øðrum orðum: ÚF og SVF sendu bæði nakað so forkunnugt sum eina konsert, báðar úr Vesturkirkjuni, júst somu tíð. Løgið, ikki so.

### Norðureftir

Hóast tað kanska ikki er so galið at búgva í høvuðsstaðnum, so kann mann onkuntíð ynskja sær at búgva onnur støð. Skuldi eg raðfest eftir útvarpssendingum, so var tað eingin ivi um, at eg vildi búð í Klaksvík.

Hesin, okkara næststørsti býur, hevur eitt ótal av sendingum knýtt at sær. Teir okkurt um 5.000 borgararnir í býnum hava góðar møguleikar at lurta eftir hvørjum. Tað mugu væl vera einar fimm sendingar um vikuna á teimum ymsu rásunum, sum hava sendingar, har bróðurparturin av tilfarinum er úr norðasta stórbýnum í Føroyum.

Um tað eitur Norðlýsið, Heimabeiti ella okkurt annað, er fyri so vítt líkamikið - tað er alt úr Klaksvík. Tey hava fingið sín part. Kanska tað eisini verður pláss fyri øðrum seinni.

## Rangt og Rætt




## Føroysk myndlist




## Natten før




## Agent 007 jages

